

Maersk Edgar leggur frá landi í Runavík eftir umvælingararbeiði hjá MEST.

# Maersk Edgar á Skálafjørðinum: MEST gjørdi eitt vala arbeiði

Deil:

Jan Müller

28.12.2014 - 16:06

Oljan.fo

Nú árið er um at vera runnið eru tað helst mong, sum síggja 2014 sum slóðbrótandi – eitt av teimum stóru og góðu árunum fyri í hvussu er ein part av føroyskari veitingarvinnu. Og tað er ikki uttan stoltleikakenslu heldur. Tí hetta varð árið, tá ein av heimsins størstu oljupallum, West Hercules, fyri fyrstu ferð nakrantíð kom á Skálafjørðin at vera

umvældur. Hetta er eisini árið, tá eitt av teimum “bláu” tangaskipunum hjá Maersk fyri fyrstu ferð kom til Føroya at vera umvælt.

Maerk Edgar er ikki av teimum allarstørstu tangaskipunum, men tó so, hann hoyrir til tey størstu skipini, sum er umvælt í Føroyum. Oljuportalurin fylgdi skipinum, tá tað helt leiðina inn um Saltnesgrynnuna við sjálvum havnastjóranum í Runavík sum loðsi á brúnni. Og vit fylgdu eisini skipunum avstaðaftur umleið eina viku seinni.

Og er tað hugaligt at frætta frá teimum, sum hava havt ábyrgd av arbeiðinum, at alt gekk væl. Føroyski Maersk inspektørurin, Páll Slættanes, sum kom til Føroya at fylgja arbeiðinum, er sera væl nøgdur við úrslitið.

“Arbeiðið, sum fyrst og fremst varð gjørt av handverkarunum hjá MEST, varð gjørt ógvuliga væl og professionelt. Tað eru bæði eg sjálvur og manningin á einum máli um. Tá ið tað kemur til góðskuna, kvalitetin á sjálvum arbeiðinum, so verður hann neyvan nógv betri,” sigur Páll Slættanes, sum leggur aftrat, at alt í alt var hetta umvælingararbeiðið eitt ógvuliga væl frágingið projekt – og afturmeldingarnar á høvuðsskrivstovuni hjá Maersk Tankers í Keypmannahavn eru sera positivar.

Eisini hjá MEST eru tey væl nøgd við hesa fyrstu uppgávuna nakrantíð at umvæla eitt av skipunum hjá Maersk.

Símun Erik Johannessen, verætlanarleiðari fyri hesi spennandi uppgávuni er samdur við Páll Slættanes, at arbeiðið varð væl greitt úr honum. “Her var alt gjørt fyri, at úrslitið skuldi vera gott, og eg kann siga, at eingin av okkara fólkum spardi seg. Allir gjørdu sítt ítarsta fyri at fáa arbeiði gjørt væl og skjótt, og eg vil eg fegin takka teimum báðum arbeiðsformonnunum, Kára Weihe og Johan Jacobsen fyri at hava megnað sínar uppgávur á ein einastandandi hátt.”

Sum skilst fer MEST í nýggja árinum at fylgja upp uppá tær báðar stóru og spennandi umvælingaruppgávurnar í verandi ári við ávikavist West Hercules og Maersk Edgar. Og skulu vit ganga eftir skoðsmálunum frá bæði norska og danska reiðaríinum, so er slóð ruddað fyri møguligum nýggjum sáttmálum í framtíðini eisini.







